

# Markleysir møguleikar

Vit bjóða tveimum ungum fólkum læruplás á skrivstovu okkara í Saltangará og á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn. Her er møguleikin at fáa eitt starv, har ábyrgd og høvi at arbeiða sjálvstøðugt fylgjast. Her verður tú ílatin neyðugu brynjuna – bæði bókliga og verkliga – til framtíðar avbjóðingar, í Føroyum ella kring um í heiminum.

Talan er um eitt læruplass, har tú lesur HD, meðan tú vinnur pening. HD er í løtuni hægsta búskaparliga útbúgvingin, ið kann takast í Føroyum, og við HD prógvi eru dyrnar latnar upp fyri víðari útbúgvingum.

Velur tú at lesa cand. merc. aud. í Danmark, bjóða vit tær møguleika fyri farloyvi og møguliga kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark.

Velur tú at lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi í Føroyum, kanst tú gera tað, meðan tú arbeiðir hjá okkum.

Eftir at hava lokið cand. merc. aud. útbúgving, er møguleiki at gerast statsgóðkendur grannskoðari.

Rasmussen & Weihe er limur í heimsins størstu grannskoðarafyritøku PricewaterhouseCoopers, ið hevur meira enn 150.000 starvsfólk í okkurt um 150 londum. Hetta samstarvið gevur m.a. okkara starvsfólki møguleikar at fáa sær starvsroyndir uttanlands – í prinsippinum allastaðni, har PricewaterhouseCoopers er umboðað.

Sjálvandi dáma okkum best, at starvsfólk, ið gera eitt gott arbeiði, ynskja at verða verandi í virkinum hjá okkum. Men vit mugu ásanna, at nógv virki leita sær eftir dugnaligum starvsfólki hjá okkum. Hevur tú viljan og evnini til at fullføra eina útbúgving hjá okkum, hevur tú óivað nógvar møguleikar í framtíðini.

Endamálið við grannskoðan er m.a. at gera tað forarbeiðið, ið skal til, fyri at átekna upplýsingar frá einum virki til umheimin. Eina átekning, ið sigur, um upplýsingarnar eru rættvísandi.

Tú fert at læra frá botni um treytir og krøv til, hvussu grannskoðan skal útinnast, og vit stuðla tær sjálvsagt allan vegin í at fullføra málið, tú setur tær. Ráðgeving er ein týðandi partur av grannskoðaravirkinum og fer at verða ein stór avbjóðing til tína bókligu og verkligu vitan um fígging og búskap. Lóggáva og ikki minst okkara innanhýsis eftirlit, seta sostatt leiðis stór krøv til yrkisliga stigið á tínum arbeiði. Tað er ein treyt, at tú kennir fulla týdningin av hugtøkum sum álit, trúvirði, ábyrgd og tagnarskyldu.

Fakliga støðið verður bygt upp gjøgnum bókliga útbúgving og starvsvenjing – sigast má tó, at tað er neyðugt, at tú ert til reiðar at taka eitt stórt tak.
Hóast grannskoðan í sjálvum sær er eitt álvarsmál, leggja vit stóran dent á at hava eitt gott og óhátíðarligt umhvørvi á arbeiðsplássinum.

**Førleikakrav**
Vit rokna við, at tú hevur tikið ella tekur studenta-, HF- ella HH prógv í summar, og tú kundi hugsað tær eina hægri búskaparliga útbúgving. Sum ein av teimum bestu í flokkinum, vænta vit, at tú hevur hug at sameina tað bókliga við tí verkliga, og at tú brennir eftir at sleppa at virka í vinnulívinum. Hóast tínar dygdir, fer útbúgvingin at verða ein stór avbjóðing.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi innan 27. mai 2001. Størvini verða sett eftir summarfrítíðina 2001, men longu í juni mánaði kunnu vit gera eina setanaravtalu.
Hevur tú spurningar ella kundi tú hugsað tær at fingið meira at vita um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen á tlf. 31 10 17

Rasmussen & Weihe er eitt grannskoðara- og ráðgevingarfelag, sum varð stovnað í 1968. Umframt at gera lógarbundna grannskoðan, ráðgeva vit á økjum sum roknskapi, bókhaldi, stovnan av virkjum, rakstrarætlanum, skattamálum o.fl. Í løtuni eru vit 25 starvsfólk í virkinum.
Høvuðsskrivstovan er í Tórshavn og ein skrivstova er í Saltangará.



Rasmussen & Weihe
Á Glaðsheyggi – Tórshavn




Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag:

# Eg skilji væl at arbeiðarafeløgini krevja meiri í løn

**– Men hendan gongdin kann ikki halda fram og tí má leggjast á annan bógv, sigur Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Gongdin, sum hevur verið nú í nógv ár, er ómealiga óheppin.

Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, heldur, at tað er neyðugt, at stór broyting kemur í tær sáttmálasamráðingar, sum nú eru á marknaðinum.

Sum støðan er, skilir hann væl, at arbeiðarafeløgini krevja meiri í løn, tí skattatrýstið er so høgt.

– Men tað ber ikki til at blíva við at hækka lønirnar, tí tað førir bara við sær, at prísirnir eisini hækka- og so kemur aftur kravið um fleiri lønarhækkingar o.sfr., o.s.fr.

Hann heldur, at vit eru longu nú á blóðskeivari kós, tí lønarvøksturin í Føroyum er størri enn í londunum, vit kappast við.

– Í Evropa er lønarvøksturin í miðal 3% um árið. so tá ið okkara lønir hækka meiri, versnar kappingarførið.

Tí heldur hann, at tað er avgerandi neyðugt, at vit leggja á annan bógv.

– ístaðin fyri at eggja til áhaldandi lønarkrøv, eiga vit í staðin at virka fyri, at vit tálma prís og kostnaðarvøkstrinum.

– Ístaðin fyri lønarhækkingar, eiga vit tí at hækka keypiorkuna við at lækka skattin.

– Men skal hetta eydnast, krevst ein góður vilji frá myndugleikunum, tí tað vera teir, sum skulu taka lut í einum slíkum átaki, saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, sigur Vilhelm Johannesen.



*– Sum støðan er, er tað sjálvsagt, at arbeiðarafeløgini blíva við at koma við lønarkrøvum. Men hetta er ikki ein gongd leið og tí er neyðugt at vendua gongdini á høvdið fyri at tálma prísvøkstrinum, og sostatt eisini lønarvøkstrinum, sigur Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag*

## Neyðugt við skattalætta

Upp undir hesar samráðingarnar, hevur Føroya Arbeiðarafelag lagt útrokningar hjá statsgóðkenda grannskoðaranum Rasmussen og Weyhe, fram. Tær útrokningarnar siga, at hesi bæði seinastu árini eru prísirnir so nógv hækkaðir, at tað er ikki eitt oyra eftir av lønarhækkingini, sum arbeiðarafeløgini fingu seinast.

Men tað skilst á arbeiðsgevarunum, at teir hava ikki treytaleyst álit á hesum útrokningum.

– Ein lítil kanning, sum vit hava gjørt, vísir, at gerandisvørur eru ikki hækkaðar nakað serligt hesi bæði seinastu árini, tvørturímóti eru summar vørur blivnar bíligari.

Tó viðgongur hann, at oljan og bensinið er hækkað so nógv, umframt at tað er dýrari at keypa hús, ella at leiga, at tað kann gera allan munin.

Men hann heldur ikki, at tað ber til at seta prísssteðg ella vinningssteðg í verk, tí tað er ov trupult.

– Men vit eiga at lætta trýstið á lønirnar við at geva skattalætta, so at keypiorkan hækkar, hóast lønirnar ikki hækka, sigur Vilhelm M. Johannesen.

– Verða lønirnar tálmaðar, fer tað eisini at tálma prísvøkstrinum. Hinvegin verður tað dýrari at baka eitt breyð, hvørja ferð, lønin fer upp. Tí hanga lønarvøkstur og prísvøkstur neyvt saman.

## Óvart tá

Annars sigur formaðurin í Arbeiðsgevarafelagnum, at tað kom ógvuliga dátt við, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag skuldi fara ío verkfall.

– Eg helt, at samráðingarnar gingu upp á stás. Men tá ið vit komu til at tosa um løn, skramblaði alt saman, tí krøvini vóru so hørð.

Hann sigur, at umframt vanliga lønarkravið upp á 15 krónur afturat um tíman hesi bæði næstu árini, hava feløgini onnur krøv um viðbøtur og annað av ymsum slag, sum kosta eini 30% afturat í lønarhækking og tað kemur ikki upp á tal, tí støðið er longu lagt við teimum 12%, sum hini feløgini hava fingið.

– Hetta vóru krøv, sum feløgini als ikki vildu tosa um og tí skrædnaði, sigur Vilhelm M. Johannesen.

Føroya Arbeiðsgevarafelag:

# Verkfallið er ábyrgdarleyst

**– Tað, sum vit hava bjóðað, er ein lønarhækking, sum er nógv hægri enn væl er fyri samfelagið, sigur Vilheml M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Vit halda, at verkfallið er ábyrgdarleyst. Hetta er eitt verkfall, sum kostar bæði vinnulívi og samfelagi dýrt.

Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, harmast um, at tað ikki eydnaðist at fáa semju ílag ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Uppskotið, sum feløgini vrakaðu, líktust tí, sum Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag góðtóku seinnapartin í gjár.

– Samanlagt er talan um ein lønarvøkstur upp á sløk 12%, og er hetta í neyvum samsvari við aðrar avtalur, sum eru gjørdar bæði á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum, sigur Vilhelm M. Johannesen.

Hann sigur, at tað kom óvart á hann, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag vrakaðu semingsuppskotið.

– Her stóð teimum í boði at fáa størsta lønarvøksturin í nýggjari tíð.

Formaðurin í Arbeiðsgevarafelagnum sigur, at onnur fakfeløg hava verið væl nøgd við støðið, sum er lagt.

– Hinvegin hava arbeiðsgevarar himprast við tann lønarvøksturin, sum feløgini hava fingið, tí hann er so ógvusligur, at hann kann skeikla føroyska búskapin.

Hann sigur, at Arbeiðsgevarafelagið heldur, at verkfallið er púra óneyðugt, tí hvørki Føroya Arbeiðarfelag ella Havnar Arbeiðskvinnufelag kunnu rokna við betri úrsliti aftaná eitt møguligt verkfall.

Frammanundan er eitt sera høgt støðið lagt í semjum við onnur feløg á arbeiðsmarknaðinum og tí skulu Føroya Arbeiðarafelag og Havnar arbeiðsmannafelag ikki vænta at fáa meiri.

– Tað støðið, sum er lagt, fara vit at halda okkum til, eisini í samráðingunum, sum nú eru slitnaðar, sigur Vilhelm M. Johannesen.

## Stríð ímillum feløg

Hann sigur, at Arbeiðsgevarafelagið ásannar eisini, at ósemjan ímillum arbeiðarafeløgini kann verða ein av orsøkunum til, at Føroya Arbeiðarafelag gjørdi av at fara í verkfall.

Hann vísir á, at í semjuni, sum týsdagin varð gjørd við Havnar Arbeiðsmannafelag og arbeiðarafeløgini í Klaksvík, vunnu tey inn aftur tann lønarmun, sum kom í undir seinastu samráðingunum, tá ið Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag fingu ein betri sáttmála á ávísum økjum, enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík fingu.

– Vit taka undir við, at arbeiðsfólkið fær somu løn fyri sama arbeiði um alt landið, og tí var tað sjálvsagt at javna tann mun, sum var íkomin, sigur Vilhelm Johannesen

## Kappingarførið versnar

Annars vísir Vilhelm Johannesen á, at við teimum lønarhækkingum, sum semja nú er gjørd um á arbeiðsmarknaðinum, fer kappingarførið í framleiðslu og útflutningsvinnuni ar versna munandi.

Í meðal er lønarvøksturin í Evropa lum 3 % um árið. Vit kunnu eisini staðfesta, at grundlønin í Føroyum nú verður 6,7 % hægri enn í Danmark, sigur hann.

Hann sigur, at hendan gongdin kann ikki halda fram, tí missur útflutningsvinnan kappingarførið, fara bæði arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar at tapa í longdini.





ABERDEEN EXHIBITION & CONFERENCE CENTRE
**4 - 7. SEPTEMBER 2001**

**Í sambandi við OFFSHORE EUROPE 2001 bjóðar Flogfelag Føroya:**
3. - 7. september (4 dagar)
3. - 6. september (3 dagar)
Hotel (einkult ella dupultkamar)
Universitetið (einkultkamar)

**Bíleggið ferðina nú!**

Aðrir upplýsingar um ráðstevnuna eru at síggja á
www.offshore-europe.co.uk

Um tygum ynskja at vera við, so setið tygum í samband við okkum:
**e-mail travel@ff.fo • tlf 340 000 • fax 340 011**

FLOGFELAG FØROYA